# Krabbameinsútgreining

## Útgreining fyri kroniskar myeloidar sjúkur

### Essentiel trombocytosa, polycytemia vera, primer myelofibrosa, CML og ikki-framkomið MDS

**Sjúkueyðkenni, ið geva illgruna um nevndu krabbasløg**

- Øktur brunatíttleiki
- Áhaldandi fepur uttan orsøk
- Bløðing javnan frá húð og/ella slímhinnum
- Øktur títtleiki av trombum
- Ótilætlað vekttap og/ella náttarsveitti
- Anæmi
- Ífylla í miltini

**Filturfunktión - blóðroyndir, ið skulu fremjast, um grundaður illgruni er**

Blóðroyndir, ið lækni skal bíleggja áðrenn ávísing

- Hæmoglobin, hæmatokrit, trombocyttar, leukocyttar, diff. teljing, CRP, Na, K, kreatinin, Ca2+, urat, ALAT, LDH, basisk fosfatase, bilirubin, INR, albumin

  Eisini skal læknin bíleggja jarn, transferrin, ferritin, cobalamin og folat, at útiloka trot/mangul, áðrenn ávísing verður send til krabbaútgreining

**Grundaður illgruni - ávísingar skulu sendast fyri**

Ikki framkomið myelodysplastiskt syndrom:

- Isolerað anæmi uttan ábending um trotstøðu (serliga við ikki framkomið MDS)
- Løtt til moderat bi- og/ella pancytopeni (anæmi, trombocytopeni, neutropeni/leukopeni uttan grundarlag fyri mangulstøðu (cobalamin, folat, ferritin))
- Ávirkað almennstøða ella týðandi bløðingsvandi

Kronisk myeloproliferativ neoplasi (PV, ET, idiopatisk myelofibrose, CML)

- Viðvarandi leukocytosa uttan upplagda orsøk (> 25 mia/l við isoleraðari leukocytosu)
- Monocytosa uttan upplagda orsøk í periferum blóði (> 1 mia/l)
- Høgt trombocyttal uttan upplagda orsøk
  *GG! Trombocyttar > 450 eftir fleiri mátingar
- Ávirkað hæmatokrit (>0,55, tá sjúklingur ikki roykir ella hevur KOL)
- Ávirkað almennstøða íroknað áhaldandi lyndi til trombosu og/ella týðiliga øktan trombosuvanda

Um ivamál er um biokemisku kanningarúrslit kann konfererast við hæmatologisku deild á Ríkissjúkrahúsinum.
GG! Hæmatologi verður røkt av donskum serlæknum, tí er frægast, at aktuelt í ávísingini í Cosmic verður skrivað á donskum.

## Ávísingin

Útfyll vinarliga ávísingarfrymilin "hæmatologi - illgruni um kroniska myeloida sjúku" undir móttakandi eindini "Krabbaútgreining" í Cosmic. Lýs støðuna undir aktuelt - íroknað nær sjúkutekini eru íkomin v.m.
Orða vinarliga ávísingina so neyvt, at tað er lætt hjá serøkinum at visitera og bíleggja viðkomandi kanningar, so útgreiningartilgongdin verður so skynsom sum gjørligt.

Útgáva januar 2026